BYGGISKRÁ 23/04438 November 2023

SAMBÝLIÐ VIÐ RYGSÁ

LANDSVERK



INNIHALDSYVIRLIT

1.0	Inngangur	3
1.1	Verkevni	3
1.2	Byggiánari og byggiharri	4
1.3	Arbeiðssetningur hjá bygginevndini	5
1.4	Áhugabólkar	5
1.5	Virksemi og bygnaður	5
1.6	Hvat er autisma	6
2.0	Skipan av byggimáli	7
2.1	Skipan undir skriving av byggiskrá	7
2.2	Skipan undir prosjektering	7
2.3	Útbjóðingarháttur	7
3.0	Fortreytir	8
3.1	Lógargrundarlag	8
3.2	Byggiøki	8
3.3	Atkomuvegur	9
3.4	Veðurlag	9
3.5	Veitingar	9
3.6	Lendisviðurskifti	9
3.7	Myndugleikakrøv	9
4.0	Krøv og ynskir til byggimálið	9
4.1	Alment	9
4.2	Orka	11
4.3	Ljóð- og ljósviðurskifti	11
4.4	Inniumhvørvið	12
4.5	Fólk við rørslutarni	12
4.6	Virkisøkir og skipan av búheiminum	13
5.0	Skipan av byggiøkinum	18
5.1	Lendi	18
5.2	Økið uttanum	18
5.3	Atkomuvegir	18
5.4	Parkering	19
6.0	Tøkni og veitingar	19
6.1	Veitingar (til bygningin)	19
6.2	Innleggingar (í bygningin)	19
6.3	Luftskifti	20
6.4	Ljós	21
6.5	Net	21
7.0	Krøv og ynski til bygningslutir	21
7.1	Konstruktiónir	21
7.2	Framsíður	21

7.3	Tekja	22
7.4	Vindeygu og større glasumráðir	22
7.5	Skilaveggir	22
7.6	Gólv	22
7.7	Loft	22
7.8	Út- og innhurðar	23
8.0	Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað	23
8.1	Innbúgv og útbúnaður	23
9.0	Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)	24
10.0	Fíggjarlig viðurskifti	24
11.0	Tíðarætlan (LV)	25
12.0	Rakstur og Viðlíkahald (ROV)	25
12.1	Projektering	25
12.2	Gransking	25
12.3	Avhendan	26
13.0	Gransking og góðskutrygging	27
14.0	Fylgiskjøl	27



1.0 Inngangur

Henda byggiskrá fevnir um byggingina av einum sambýli til fólk við autismu, ið skal byggjast á Argjum.

Sambýlið skal byggjast á parti av matr.nr. 256, Kirkjubøur/Argir í Tórshavnar Kommunu, og fevnir byggiskráin bæði um bygning, atkomu, parkeringsøki og uttanumøki.

Byggjast skal eitt sambýli á umleið 1.700 m² brutto (netto umleið 1.300 m2) í einari hædd. Sambýlið skal líkjast einum privatum heimi, og skal tí fella væl inn í bústaðarumhvørvið, ið liggur upp at byggiøkinum. Sambýlið er býtt upp í fýra búeindir, og skulu einstøku eindirnar ikki órógva hvørja aðra.

Fólk við autismu eru sera ymisk og hava hvør sín serstakan tørv. Hetta skal sambýlið rúma. Búfólkið skal kenna seg væl í heimligum tryggum umhvørvi.

Alt byggiøkið skal hugsast inn í verkætlanina. Staðseting av atkomu og parkeringsøki skal loysast á skynsaman hátt, har hugsanin um eitt heimligt heim skal raðfestast høgt. Uttanumøkið kring heimið skal rúma uttandura aktivitetum av ymsum slagi. Týdningarmikið er, at sambýlið er væl vart móti vindi og regni og ikki minst móti larmi. Samlaða byggiøkið er áleið 9.250 m².

1.1 Verkevni

Landsstýriskvinnan hevur tikið avgerð um at seta eina bygginevnd at gera eina byggiskrá til byggingina av einum sambýli til fólk við autismu við 24 búplássum.

Undan hesum hevur ein arbeiðsbólkur, mannaður við umboðum úr Almannamálaráðnum, Almannaverkinum og Landsverki, gjørt eina funktiónsgreining, ið lýsir innihaldið og krøv til eitt sambýli til fólk við autismu. Autismufelagið er hoyrt í tilgongdini. Funktiónsgreiningin varð handað síðst í september 2022.

Bygginevndin skal gera eitt tilmæli, eina byggiskrá, lýsa krøv til ymsu rúmini og nettoareal og útfrá byggiskránni gera eina kostnaðarmeting. Arbeiðið hjá bygginevndini skal taka útgangsstøði úr funktiónsgreiningini.

Bygginevndin hevur viðgjørt arbeiðssetningin og er komin til ta niðurstøðu, at verkætlanin fevnir um eitt sambýli til 24 fólk við autismu (18 ár og eldri), ið hava miðal til stóran tørv á hjálp og stuðli í gerandisdegnum. Umstøður skulu vera til náttarvakt. Dentur skal leggjast á, at einstøku búeindirnar og bygningurin í síni heild eru so heimligar og hugnaligar, sum til ber, og hava so lítlan stovnsligan dám, sum til ber.

Meiri nágreinilig krøv og ynskir frá bygginevndini eru lýst seinni í hesi byggiskrá.



1.2 Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn
ammr@ammr.fo

Byggiharri/ráðgevi:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Bygginevnd:

Hallur Thomsen, formaður
Almannaverkið, depilsstjóri

Elisabeth Christiansen
Almannaverkið, eindarleiðari

Jeanette Ellefsen Blaasvær (til og við góðkenning av byggiskrá)
Almanna- og mentamálaráðið, deildarstjóri

Lív Patursson
Almanna- og mentamálaráðið, fulltrúi (frá 1. september 2023)

Verkætlanarleiðari:

Nina A. Arge
Landsverk, arkitektur
niar@lv.fo

Verkætlanarfulltrúi:

Helena H. Johannesen
Landsverk, fulltrúi
hehj@lv.fo

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er at tryggja, at búfólkini og starvsfólkini fáa virðiligar karmar at nýta og virka undir, og mæla til loysnir í byggimálinum, sum eru í samsvari við hetta og ásettu karmarnar í byggiskránni.



1.3 Arbeiðssetningur hjá bygginevndini

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er

- at tryggja, at funnið verður fram til loysnir, ið hóska best til endamálið við atliti at givnum umstøðum, harundir at búfólkini fáa hóskandi karmar at húsast í

Bygginevndin skal taka hædd fyri

- at vardu bústaðirnir eru heimið hjá búfólkunum, og at byggistílur og -snið endurspegla hetta, soleiðis at bygningurin er heimligur og ikki stovnskendur
- at bústaðirnir skulu í minst møguligan mun skilja seg frá bústaðarumhvørvinum annars
- at uttanumøkið, og hvussu hetta kann nýtast, skal hugsast við í heildina

Arbeiðssetningurin hjá bygginevndini er

- at gera byggiskrá
- lýsa krøv til ymisku rúmini og nettoareal
- útfrá byggiskrá gera eina kostnaðarmeting

Bygginevndin skal haraftrat

- meta um skipanaruppskotið við atliti at funktiónaliteti
- leggja fram skipanaruppskotið fyri brúkarum og áhugafeløgum
- gera tilmæli til landsstýriskvinnuna at taka støðu til, tá skipanaruppskot og prosjektuppskot er gjørt
- hoyrast, tá frávik eru í mun til byggiskrá, viðgera møguligt broytingaruppskot, ið ávirka funktiónalitet, góðskustøði og byggilist og gera tilmæli um uppskot til broytingar verða gjørdar, ið ávirka funktiónalitet og góðskustøði

Bygginevndin skal, í tann mun tað er skynsamt og møguligt, endurnýta tilfar, ið áður er framleitt í sambandi við byggingina av vardum bústøðum. Bygginevndin skal leggja seg eftir at finna ódýrar loysnir, sum tó eru haldgóðar og lættar at viðlíkahalda. Bygginevndin skal somuleiðis leggja seg eftir at nýta kendar og haldførar loysnir

Bygginevndin verður í sínum arbeiði eisini biðin um at hava í huga, at bygt eigur at verða á tann hátt, at atlit verða tikin at rakstrarligum skynsemi.

Bygginevndin skal í sínum arbeiði virka fyri, at ein so stórur partur sum gjørligt av prosjekteringini av vardu bústøðunum verður brúkt sum grundarlag fyri framtíðarbygningum av hesum slagi, tó við teimum neyðugu tillagingunum, sum eru neyðugar til líknandi bygningar.

Bygginevndin tryggjar saman við LV, at allir viðkomandi áhugabólkar, herundir kommunan í økinum, verða kunnað í byggitilgongdini.

1.4 Áhugabólkar

Bygginevndin fer í tilgongdini at kunna og hoyra Autismufelagið, starvsfólk og avvarðandi. MEGD og limafeløg hjá MEGD, verða tikin við í tilgongdini og verða kunnað um endaligu byggiskránna.

1.5 Virksemi og bygnaður

Verkætlanin hevur til endamáls at útvega ein bústað til fólk við autismu.Tørvur er á einum nýggjum sambýli, og í løtuni er bíðilisti til búpláss. Komandi árini fer tørvurin at vaksa.



Sambýlið skal virka sum heim fyri búfólkini, har hesi kenna seg trygg í heimligum umhvørvi, og har stimbrað verður undir trivnaðin. Sambýlið skal geva búfólkunum ymiskar upplivingar, sum hava mennandi innihald.

Sambýlið skal veita sernámsfrøðiliga viðgerð innan autismu í einum tilvitaðum, málrættaðum og mennandi umhvørvi. Dentur verður lagdur á virðing mótvegis tí einststaka, og at hvør einstakur verður stuðlaður í at hava mest møguliga ávirkan á egið lív.

Tá fult virksemið er á sambýlinum, fara millum 8-15 starvsfólk at starvast samstundis, býtt út á tær ymisku eindirnar. Samanlagt fara eini 30-40 starvsfólk at verða knýtt at sambýlinum. Sameining av starvsfólkunum er týdningarmikil fyri teirra trivnað, og verður tískil gjørd starvsfólkaeind, har hesi kunnu vera saman í matarsteðgi ella øðrum steðgi, har møguleiki er fyri at hava eina samveru uttan um arbeiði.

1.6 Hvat er autisma

Teksturin niðanfyri er umsett brot úr "Mennesker med autisme – sociale indsatser, der virker". [1]
Øll útgávan í uppruna teksti, liggur sum fylgiskjal 02.

Autisma er ein samansett virkisforðing, sum kemur fyri í ymsum stigum og formum. Autisma ávirkar áhugamál, persónsmenning og lívsstøðu hjá fólki – í øllum støðum og sambondum, sum fólk við autismu eru partur av.

Avbjóðingin er ymisk frá einum til annað, alt eftir hvar í lívinum persónurin er, og eisini hvussu umhvørvið hjá viðkomandi er háttað. Sermerkið við austimu er ein øðrvísi og ofta seinkað menning á økjum sum sosialt samspæl, sosialt samskifti, atburður og áhugamál. Hetta merkir millum annað, at fólk við autismu kunnu hava trupult við at liva seg inn í, ella ímynda sær, hvat onnur fólk hugsa og føla. Tey kunnu hava trupult við at avlesa, hví onnur bera seg at, sum tey gera, og tí er ofta trupult hjá teimum at vera partur av einari sosialari samveru, og endar hendan tískil ofta við misskiljingum. Tey hava ofta trupult við ymsum ljóðum og luktum. Avbjóðingin við følisansinum kann eisini ávirka hugin neiliga til at vera í klæðum, fara í bað, vaska hár o.a. Hesar avbjóðingar hava ávirkan á, hvussu fólk við autismu samskifta og samspæla við umhvørvið.

Fólk við autismu hava ofta angist, tunglyndi, sjálvskaðandi atburð, ADHD, útvirkandi atferð, menningartarn, epilepsi, etingarólag umframt onnur sjúkueyðkenni og sjúkur. Hesar avbjóðingar kunnu ávirka lívsgóðskuna, umhvørvi og teirra sosiala átak á nógvar ymiskar hættir.

Eisini er grein "Om at skabe et autismevenligt miljø", [2] løgd við sum fylgiskjal, sí fylgiskjal 03. Greinin lýsir ymiskar avbjóðingar, sum fólk við autismu hava í mun til tað fysiska umhvørvið, sum ávirkar tey dagliga.


[1] Beyer, J. Kaas, M. Kaufmans, C. H. Jørgensen, M. H. (2014) Mennesker med autisme. 1.útgáva. Socialstyrelsen.

[2] Psykologhuset AArhus


2.0 Skipan av byggimáli

2.1 Skipan undir skriving av byggiskrá

Arbeiðið at skriva byggiskránna hevur verið skipað soleiðis:



2.2 Skipan undir prosjektering



2.3 Útbjóðingarháttur

Arbeiðstøkan skal bjóðast út sum høvuðsarbeiðstøka ella stórarbeiðstøka.

3.0 Fortreytir

3.1 Lógargrundarlag

Byggiøkið er á Argjum í A3 byggiøki.


Sambært byggisamtyktini hjá Tórshavnar Kommunu eru ásetingar fyri A3, at økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Byggistig er 0,3. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.

Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

Virksemið á sambýlinum verður rikið eftir lóg um almannatrygd og tænatu § 46.

3.2 Byggiøki

Byggiøki er á matr. nr. 256. Samlaða víddin er áleið 9.250 m².



Bygningurin skal staðsetast soleiðis, at plass skal verða fyri at byggja annan bygning á stykkinum. Eisini er frástøða til ánna sambært byggisamtykt.



3.3 Atkomuvegur

Atkoman til sambýlið verður frá nýggjum atkomuvegi, sum enn ikki hevur fingið navn.

3.4 Veðurlag

Ráðgevin skal seta seg væl inn í veðurviðurskiftini á staðnum og skal staðseta atkomu, bygning, útiøki o.a. á besta hátt í mun til veður og vind.

3.5 Veitingar

Víst verður til www.kortal.fo og útstykkingar verkætlan hjá TK ísv. verandi tøkniligar veitingar, vatn, kloakk og frárensl í økinum.

3.6 Lendisviðurskifti

Lendi er hagalendi.

3.7 Myndugleikakrøv

Byggingin skal fylgja almennu byggisamtyktini BK17, umframt Almennu byggisamtyktin, TK A3 - 3. grundumráðið, sum er galdandi fyri økið.
Aðrir viðkomandi faknormar og vegleiðingar fyri ávísu byggingina skulu somuleiðis fylgjast.

Bygningurin er flokkaður undir nýtsluflokki 6, har krav er til m.a. ABA skipan.

Uttanhýsis ráðgevin avgreiðir byggiloyvið, grundað á alment galdandi krøv og ynskir, sum eru lýst í byggiskránni. Í hesum sambandi skulu viðurskiftir við brunamyndugleikar, arbeiðseftirlitið, SEV, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, friðingarmyndugleikar o.o., ið hava ásetingar viðvíkjandi byggimálinum, eisini avgreiðast.

4.0 Krøv og ynskir til byggimálið

4.1 Alment

Aðalmálið fyri sambýlið er at veita fólki við autismu góðar bústaðakarmar soleiðis, at hesi kunnu stimbrast og trívast í heimligum umhvørvi.

Byggjast skal eitt sambýlið, sum er umleið 1.700 m² brutto skal byggjast í mesta lagi tveimum hæddum, møguliga kunnu onkur rúm leggjast forskoti, alt eftir lendi.

Útgangsstøðið er, at málbólkurin eru vaksin fólk (t.e. 18 ár og eldri) við autismu, sum hava miðal til stóran tørv á hjálp og stuðli í gerandisdegnum. Umstøður skulu vera til náttarvakt.

Talan er um heimið hjá fólki, og tí eigur dentur at vera lagdur á, at einstøku búeindirnar og bygningurin sum heild eru so heimlig og hugnalig sum til ber og hava so lítið stovnsligan dám, sum til ber.
Búeindirnar skulu vera soleiðis, at búfólkini kunnu seta sín persónliga dám á og soleiðis gera bústaðin til

sítt serstaka heim. Bygningurin skal taka støði í meginregluni um algilt snið og eigur í skapi og sniði at fella væl inn í nærumhvørvið.

Úti

Búfólkini skulu hava atgongd til skermað útiøki, sum eru egnað til hugsavnan og sansastimbran. Eisini skulu ávísar íbúðir hava egna avskermaðan garð.

Tað skal bera til at koma til sambýlið við lítlum bussi.

Leggjast skal eftir, at búeindir og felagsøki ikki eru størri, enn neyðugt er.

Fólk við autismu eru ofta serliga viðkvom fyri sansaligari stimbran, tað verið seg frá ljóði, ljósi, litum, lukti og kropsligari kenslu (taktilt). Atlit skal takast at hesum í øllum lutum byggingini viðvíkjandi. Íbúðirnar skulu vera væl ljóðbjálvaðar, og allar innleggingar skulu vera ljóðveikar ella staðsettar soleiðis, at tær ikki órógva búfólkini, har tey uppihalda sær.

Skipan

Skipanin av felagsøki og starvsfólkaøki verður eftir sama leisti, sum í nýggja sambýlinum á Mýruni, eins og atlit verða tikin at arbeiðsgongdum (work-flow) á sama hátt, sum gjørt er á Mýruni. Á sambýlinum á Rygsá verður tó ynskt, at eindir eru meira skermaðar frá hvørjari aðari. Felagsøki skulu skipast á ein hátt, at felagsøkir hava nógv skermaði øki.

Hvør eind eigur at hava egið uppihaldsøki til búfólk, viðkomandi hjárúm og ein húsarhaldskøk.

Felags fyri sambýlið eiga at vera sansarúm, vásarúm, stórkøkur, eitt mulitrúm til rørslu, ítriv og samrøður, skrivstovuhøli, starvsfólkagarderoba, starvsfólkaves, starvsfólkarúm umframt skrivstovu til leiðaran.

Neyðug høli/goymslurúm í sambandi við reingerð, klædnavask og tøknirúm skulu vera á hóskandi stað í bygninginum. Møguleiki skal vera fyri at turka klæðir uttandurða, uttandurða goymsla og skúrur/pláss skal vera til renovatión.

Hugsast skal um arbeiðstøðurnar hjá starvsfólkum, um hóttandi støður koma fyri, soleiðis at tey sleppa til rýmingar, eitt nú við tveimum hurðum í rúminum. Gongsøki má ikki vera smalari enn 1,5 m. Smalar gengur kunnu elva til fysiskan tvídrátt og mugu ikki vera langar og einstáttar.

Íbúðir skulu ikki hava opið undir tróðrið, og ongar innskotnar hæddir ella hemsur. Somuleiðis skulu felagsrúm hava nógvar krókar, og ikki vera stór fýrkantað rúm. Møguleiki skal vera fyri myrkalegging av búrúmum. Yvirflatur skulu vera lættar at gera reinar og lættar at litseta eftir tørvi.

Tað er umráðandi, at allar yvirflatur og atkomiligir bygningslutir annars tola dagliga reingerð við sóttreinsandi vaskievni. Í økjum, har búfólk koma, skulu yvirflatur, atkomiligir bygningslutir og innbúgv tola harðliga viðferð.

Tað er eitt krav, at bygningurin verður bygdur við loysnum, sum eru kendar í føroysku byggivinnuni.

Tað er eitt krav, at bygningurin hevur heimligan dám at líkna føroyskum sethúsum og fellur væl inn í nærumhvøvið. Sambýlið skal passa til umhvørvið í skapi, støddd, tilfari og liti. Dentur skal leggjast á, at rætta tilfarið, konstruktiónir, bygningsloysnir og tekniskar innleggingar verða valdar í mun til haldføri og góðsku, soleiðis at rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur vera minimalar.



4.2 Orka

Sambýlið skal byggjast og rekast sum ein lágorku bygningur. Veljast skal varandi orkuveiting og orkuvinarligar tøkniskipanir/ útbúnaður. Tilfarsvalið skal vera orkuvinarligt og skal í størstan mun leingja um livitíðina á bygninginum, í tann mun hetta letur seg fíggjarliga gera.

Tilfarsval ísv. útiøkið skal passa til føroysku náttúruna og veðurlagið.

Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði og skulu tøkni og veitingar tískil veljast við atliti at hesum. Raðfesting av hitaskipan:

1. Fjarhiti. Tað skal kannast við Fjarhitafelagið, um bygningurin kann knýtast í fjarhitaskipanina.
2. Jarðhiti
3. Luft til vatn hitapumpur (ikki optimalt, tá brúkarir eru sera viðkvom fyri ljóði)

4.3 Ljóð- og ljósviðurskifti

Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði. Tað er tí av stórum týdningi, at ljóðviðurskiftini kring bygningin og inni í bygninginum eru nøktandi.

Tað eru ikki ásett nøkur krøv ella markvirðir fyri persónar við autismu í Byggningskunngerðini frá 2017 (BK17) ella Donsku bygningskunngerðini frá 2018 (BR18).

Viðv. akustiskt inniumhvørvi til bústaðir, vísa BK17 og BR18 til Dansk Standard 490 (DS 490) - *Lydklassifikation af boliger.*

DS 490 bólkar akustisku krøvini í ljóðklassar, sum eru hesir :

Lydklasse A
Lydklasse svarende til specielt gode lydforhold, hvor beboerne kun lejlighedsvis forstyrres af lyd eller støj.

Lydklasse B
Lydklasse med tydeligt bedre lydforhold end byggelovgivningens minimum krav for boliger. Beboere bliver kun i begrænset omfang forstyrret af lyd eller støj.

Lydklasse C
Lydklasse svarende til intentionerne i byggelovgivningens minimum krav. Op til mellem 15% og 20% af beboerne kan forventes at blive forstyrret af lyd eller støj.

Lydklasse D
Lydklasse beregnet for ældre bygninger med mindre tilfredsstillende lydforhold. Bør normalt ikke anvendes for nye bygninger.

Ljóðklassi C verður nýttur sum minsta krav til bústaðir, men fyri hesa verkætlan verður ljóðklassi A nýttur. Markvirðini í ljóðklassa A og B taka atlit til búgvandi, ið eru ljóðviðkvom. Í samráð við bygginevnd kann ljóðklassi B nýtast, um so er, at tiltøkini fyri at lúka ljóðklassa A gerast ov umfatandi. (sí Fylgiskjal 07 _ Ljóð og akustikkur fyri sambýlið til fólk við autismu.

Í samráð við bygginevnd kann ljóðklassi B nýtast, um so er, at tiltøkini fyri at lúka ljóðklassa A gerast ov umfatandi.



Ynski er at ongar gáttir eru, og tí má bygginevnd inndragast, um so er at krøv til gáttir og ljóðkrøv ikki ganga hond í hond.

Bygningurin skal staðsetast soleiðis á byggiøkið, at óljóð frá bilum o.l. verður avskermað og á ongan hátt órógvar inni í bygninginum. Somuleiðis skulu parkeringsviðurskiftini inni á byggiøkinum staðsetast soleiðis, at heldur ikki hesi geva óljóð frá sær inn í bygningin.

Í projekteringstilgongdini skal ljóðráðgevi verða við í tilgongdini, soleiðis at tryggjað verður røttu ljóðviðurskifti.

Projekttilfarið skal lýsa ljóðstøðið í ávísa rúminum og ljóðkrøv til bygningslutir ímillum rúm. Stór krøv skulu setast til útinning av ljóðtetting í byggitíðini.

Serlig atlit skulu takast at ljósi. Fólk við autismu kunnu vera sera viðbreknir um natúrligt ljós og ljósútbúnað. Val av glasfeltum og ljósútbúnaður skal gerast í tøttum samstarvi við bygginevnd, so rætta loysn verður vald. Møguleiki skal verða at dempa flest øll ljós, har tað gevur meining í mun til virksemi. Blankar yvirflatur skulu avmarkast, eins og stórar vindeygalflatur. Møguligt skal vera at myrkaleggja og avskerma vindeyguni.

Málbólkurin er sum heild viðbrekin í mun til ljós, og tí er ráðuligt at ljósráðgevi er partur av tilgongdini.

4.4 Inniumhvørvið

Inniumhvørvið skal tryggjast við atliti at atmosfæriskari, termiskari og sansaligari góðsku. Skipanir skulu tryggja, at hitin í rúmunum er hóskandi til virkisøkið í rúminum, og at stýringin kann gerast skynsamt. Krav verður sett til, at gólvhiti er í øllum gólvum.

Luftskiftisskipanir skulu tryggja góðskuna á inniluftini smb. galdandi ásetingunum. Fyrilit skal havast fyri, at skipanirnar eru einfaldar at stýra, bæði í mun til orku og virkisøki. Luftskipan skal verða til øll rúm í húsinum sum útgangsstøði – undantøk kunnu gerast saman við bygginevndini.

Val av tilfari skal tryggja, at góð luftgóðska er í rúmunum – tilfar skal í minst møguligan mun lata partiklar/damp frá sær.

Dentur skal leggjast á at fáa dagsljós inn í øll rúm, har krav er um tað. Virksemið í ymsum rúmum má ikki avmarkast vegna blendandi dagsljós. Hugsast skal um at tillaga ljósviðurskiftini eftir krøvum og ynskjum hjá búfólkunum. Fólk við autismu kunnu vera sera viðbrekin í mun til ljós. Stórar glasflatur skulu avmarkast. Ongar blankar yvirflatur mugu vera, so at ljós endurspeglast. Neyðugt er at hugsa um ikki at hava ov sterkar litir, men heldur at nýta náttúrulitir ella jarðlitir.

Ansa eftir at inniumhvørvið ikki ávirkast av veðrinum. Ov stór vindeygu kunnu gera, at tað er ov heitt tá sólin stendur á, og ov kalt, tá veðrið er ringt.

Eftirsum at búfólkini eru serliga viðkvom yvirfyri ljóði, skal luftskipanin vera so ljóðleys sum til ber.

4.5 Fólk við rørslutarni


Sambýlið skal skipast soleiðis, at fólk við rørslutarni lættliga kunnu flyta seg runt í øllum bygninginum. Kravið er eisini galdandi fyri atkomu til bygningin; víst verður til bygningskunngerðina BK17.

Málbólkurin, sum bygdur verður til, er vanliga ikki rørslutarnaður, men hædd skal takast fyri, at búfólk kunnu blíva rørslutarnaðir við árunum, og tí mugu atkoma til bygnining liva upp til BK17.

4.6 Virkisøkir og skipan av búheiminum

Sambýlið er skipað í fýra búeindir, sum savnast kring eina felagseind. Rúmini vera lýst niðanfyri og skipanin av teimum lýst í myndum

Skipan av sambýlinum:





4.6.1 Rúmslýsing, felagseind:

Starvsfólkarúm í felagseind:
Rúm til starvsfólk at møtast til fund ella sosialt. Stórt borð til 12 fólk, og sovisofa. Lítlan kaffikøk (3 element)

Starvsfólkaves:
Eitt vanligt við brúsu.

Vesi til vitjandi – alment, RT-stødd

Starvsfólkagarderoba:
Skáp til 40 starvsfólk.

Felagskøkur:
Á felagsøkinum skal vera ein felagskøkur, sum ger mat til alt húsið. Støddin er til at gera mat til 40 fólk samstundis, og hann skal gerast soleiðis, at hann kann góðkennast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

- Felagskøkurin skal hava eitt rúm, sum er ein matvøru móttøka, sum hevur ella liggur tætt við eina inngongd, so tað er lætt at fáa matvørur inn, tá ið maturin verður avskipaður til sambýlið. Goymslan skal hava/minna um ein vásakøk við nógvum yvir og undir skápum og eitt hondvask. Eisini skal verða rúm fyri einum stórum frystiskápi og einum stórum køliskápi.
- Í felagskøkinum skal verða ein industri uppvaskimaskina, við stál borði v/vaski til skiti og stál borð til reint.

Vaskirúm:
Vaskirúm skal innrættast við seks vaskimaskinum og seks turkitrumlum, í húsarhaldsstødd, men í industri góðsku. Sokkul skal gerast undir hesum, umleið 40 cm upp frá gólvinum. Arbeiðsborð við køksvaski skal vera fram við veggi. Undir og yvir borðplátu skulu hillar kunna setast upp á veggin til goymslu. Skal staðsetast har tað órógvar búfólk minst. Møguleiki skal vera fyri at ganga út í tún til snór undir taki.

Leiðaraskrivstova:
Leiðaraskrivstovan skal innrættast við einum skriviborði, skrivstovustóli, fundarborði og stólum til 3-4 fólk. Á vegg skal gerast pláss til at heingja sjónvarp e.l. Innleggjast skal net-stikk. Pláss skal gerast fyri reol-veggi.

Reingerðarrúm:
Reingerðarrúm er rúm til vaskivogn og dustsúgvara. Í reingerðarrúmi skal vera reingerðarvask og spulikrani. Á vegg skulu hillar setast upp til goymslu.

Tøknirúm:
Tøknirúm íroknað ventilatiónsrúm skal staðsetast, har tað órógvar búfólk minst. Støddin er tengd at útgerðini í rúminum.

Goymsla:
Alt sambýlið skal hava eina goymslu, við stál reolum 40 cm djúpar – umleið 10 metur. Skal vera rímuliga tætt við inngongd, í sambandi við stór innkeyp av pappíri, blæðum og aðrari "nonfood" vøru.

Sansarúm:
Eitt rúm til hugssavnan og sansastimbran, við einum massagestóli, litljósi og tónleiki. Ikki neyðugt við vindeyga. Støddin er tengd at útgerðini í rúminum.



Multirúm til Ítrivs, rørslu og samrøður:
Eitt rúm til kreativitet og vera virkin. Rúm til búfólk, sum ikki hava dagvirksemi, og mugu verða heima. Rúmið skal hava ein lítlan køk við vaski og nøkrum skápum. Annars eitt borð til átta fólk. Hetta rúm kann eisini brúkast til samrøður. Rúmið skal hava rimar, ringar undan loftinum, sensit stól og líknandi útgerð. Støddin er tengd at útgerðini í rúminum. Ljóð og ljósviðurskifti eiga, á sama hátt sum í øllum bygninginum, at vera tillagaði serliga tørvinum hjá búfólkunum hesum viðvíkjandi.

Vásarúm:
Eitt rúm til vatngleði og undran. Vatn hevur góða virkan á fólk við autismu, og tey fáa frið á seg og kunnu hugsavna seg longi. Rúmið skal vera eitt stórt baðirúm við sansabrúsu og stórum baðikari. Innrætting av rúminum skal hava arbeiðsstøðurnar hjá starvsfólkinum í huga. Støddin er tengd at útgerðini í rúminum. Rúmið skal vera eitt vátrúm við røttum vátrúmstilfari og frárenning í gólvi.

Úthús:
Upp at høvuðsinngongdini skal ruskrúm og goymslurúm staðsetast.

Ruskrúm:
Ruskrúmið skal í stødd svara til, at burturkastbingjur til ávikavist húsarhaldsburturkast og endurnýtslupappír og papp lættliga kunnu rúmast í rúminum. Staðseting, útlufting, innrætting o.l. umstøður av ruskrúmi skulu fylgja krøvum, ið Tórshavnar kommunu hevur á økinum. Ljós skal leggjast í goymslurúmið umframt frárenning í gólvið.

Goymslurúm úti:
Goymslurúm skal nýtast til goymslu av ymsum uttandura leikum, súkklum, grill og havamøblum. Goymslurúmið skal vera turt og væl ventilerað. Ljós skal leggjast í goymslurúmið, umframt frárenning í gólvið. Goymslurúmið skal innrættast við hillum á veggi. Goymslurúm skal kunna læsast av. Stødd á goymslurúmi skal vera umleið 10 m².


4.6.2 Búeind
Hvør av teimum fýra búeindinum er roknað til seks búfólk.

Ein búeind er til búfólk við serliga tungum tørvi. Í sambandi við hesa eindina eigur at vera skermað útiøki við manshøgari girðing, sum ikki sæst inní uttanífrá. (Dømi um slíka girðing er í bú- og viðgerðarstovninum Millum Gilja.)

Hvør búeind fevnir um seks íbúðir við hvør sínum felags uppihaldsrúmi, viðkomandi hjárúm og húsarhaldskøki.

Staðseting av búeindunum í mun til ferðslu og onnur hús, gøtur o.a. Og hvar búeindin til tey, við tyngri tørv er staðsett.

Skipan av hvørjari eind:



Hvør íbúð rúmar stovu, kamar, baðirúm, durð og hevur beinleiðis atgongd til skermað útiøki.

Rúmslýsing, búeind:

Uppihaldsrúm í eind:
Uppihaldsrúmið skal rúma felags máltíðum og sosialum felagsskapi. Rúmið skal helst vera eitt krókut, og ikki eitt stórt kvadratiskt rúm. Uppihaldsrúmið skal innrættast við spísiborðum og stólum til 10 búfólk/starvsfólk, sum sita við 2-3 borð við rímiligari frástøðu millum borðini. Her skal eisini vera pláss sofu og vegghongdum sjónvarpi.

Køkur skal innrættast sum vanligur køkur í einum føroyskum húsarhaldi. Skal hava vanligar hentleikar, men ikki verða stórur.


Skrivstova í eind:
Rúm til starvsfólk at vera nærverðandi á eind, og møguleika fyri at skjalfesta. T.e. eitt skrivaraborð og ein bleytan stól.

Uppihaldsrúm til náttarvakt:
Pláss skal vera hjá sovandi náttarvakti at leggja seg. Tvey uppihaldsrúm skulu vera til fýra eindirnar. Hetta skal staðsetast millum skrivstovurnar fyri hvørja eind.

4.6.3 Íbúðir

Umleið helvtin av øllum íbúðum eiga at hava egna inngongd uttanífrá. Inngongdin skal kunna brúkast í øllum veðri, og møguleiki skal vera fyri at heingja yvirklæðir upp og at seta skógvar frá sær. Eisini skal vera inngongd frá felagsgongini.

Skipan av íbúðunum:



Rúmslýsing, íbúð:

Kamar:
Skal rúma eini einkultari song, klædnaskápi og einum songarborði.

Stova:
Stova í tvey rúms íbúð, skal rúma tvey mans-sofu, einum lenistóli, sofaborði, reol, borð og stólar. Pláss skal vera fyri vegghongdum sjónvarpi. Inni í stovu skal vera net- og antennustikk.
Møguleiki skal vera fyri at kunna seta innbúgv á ymsan hátt, tí búfólkini hava ymsan tørv.
Frá stovu skal vera útgongd til úti-økið, við møguleika at seta útiklæðir frá sær.



Klædnaskáp skulu staðsetast í einari nisju í íbúðini.
Lítil tekøkur skal vera við køliskápi og vaski v/skápi og skuffum. Møguleiki skal vera hjá starvsfólkum at steingja fyri vatninum við lykli.

Baðirúm:
Allar íbúðirnar skulu hava egið vesi/bað, sum er nóg stórt til, at eitt starvsfólk fær hjálpt búfólkinum í sambandi við nýtslu av vesi/bað. Baðirúm skal innrættast við vanligum hentleikum. Spegl á vesi skal ikki byggjast inn í vegg og skal hava hert og laminerað glas. Á baðirúmi skal vera minst eitt stk. el-stikk til barbermaskinu, hárturkara e.l.
Durður:
Ein durður skal vera sum ein "buffari" millum íbúð og felagsøki. Her skal vera pláss at hanga klæðir frá sær og stilla skógvar. Hurðar inn í íbúðir skulu ganga inn í íbúðir. Breidd á hurðum skulu vera nóg breiðar til koyristól.

Útiøki:
Útiøkið skal vera ájavnt gólvhædd í íbúðini. Útiøkið skal vera við slættari álegging. Hálvveggur skal vera ímillum øll útiøkini, soleiðis, at einstøku íbúðirnar ikki síggja inn til hvørja aðra. Durður ella vindverja skal vera millum útiøki og stovu, soleiðis, at gjøstur og avfall ikki kemur inn. Eisini skal vera møguleiki at seta eitt nú vátar skógvar frá sær her.

5.0 Skipan av byggiøkinum

Ein partur av økinum skal varðveitast sum "grønt øki". Hetta merkir, at økið skal vera óslætt, nakað sum hagalendi. Víddin av økinum er tengd at staðsetingini av bygninginum, atkomuni og uttandura virksemi.

5.1 Lendi

Lendið skal kannast, drenast og viðgerast smb. galdandi krøvum. Uppfylling og steinseting skal m.a. tryggja, at væta á ongan hátt treingir inn í bygningin frá undirlendinum.

Við allar inngongdir, har gólvhædd er á lendishædd (niveaufrítt), skal rist e.l. leggjast, so eisini her kann tryggjast gott hall út frá bygningi samstundis við, at krav um atkomuviðurskifti vera hildin.

5.2 Økið uttanum

Uttanumøkið skal skipast soleiðis, at góðir møguleikar vera hjá búfólkunum at uppihalda sær úti. Nógvir krókar við lívd skulu virka sansamennandi fyri búfólkini. Hetta kann gerast m.a. við planting sum verja móti vindi. Plantusløg skulu veljast, sum eru harðbal í mun til veðrið, eru vetrar grøn og stimbra sansirnar. Uttanumøkið skal gerast samstundis sum bygt verður.

5.3 Atkomuvegir

Atkomuvegur skal vera við gonguteigi í aðrari síðuni.

Atkoman til bygningin skal skipast soleiðis, at bussur kann koyra til høvuðsdyr at seta koyristólsbrúkarar av. Brandbilar, sjúkrabilar o.s.fr. skulu hava góðar atkomumøguleikar og skulu sleppa heilt til dyrnar. Serstøku krøvini til atkomumøguleikar hjá tilbúgvingini skulu fylgjast. Vøru-

innkoyring, ruskbilar o.l. bilar skulu somuleiðis hava plass til at koyra til høvuðsdyrnar at seta vøru av ella heinta rusk. Skipað ruskrúm skal vera leyst frá bygginginum, tætt við høvuðsinngongdina.

5.4 Parkering

Parkeringspláss skal gerast sambært galdandi byggisamtykt fyri økið.
Upp at høvuðsinngongd skal liggja parkeringspláss. Parkeringarsøkið skal skipast soleiðis, at óljóð frá bilum o.l. verður avskermað og á ongan hátt órógvar inni í bygninginum.

Parkeringsøki skal gerast til umleið 33 bilbásar, ella tað sum svarar til ein bilbás pr. 50 m2 húsavídd, harav fýra básar skulu vera til fólk við rørslutarni. Eisini skulu gerast tvey parkeringspláss til bussar til rørsutarn (bilstødd L3) Parkeringsøkið skal vera asfalterað ella gras armering. Sambýlið hevur 12-14 starvsfólk og búfólk hava ikki bil.

Løðistøð til el-bilar
Nýggir bygningar eiga at hava løðistøð til el-bilar. Undir øllum umstøðum skal vera gjørt klárt til uppsetan av løðistøð við staðsetan av P-plássi og dragirør til kaðalar til løðistøð.

6.0 Tøkni og veitingar

Skipanir/útbúnaður/stýringar skulu lýsast og veljast í mun til livitíð, viðlíkahald og heildarkostnað, eisini við atliti at orkunýtslu. Harumframt skulu skipanirnar/útbúnaðurin setast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald kann gerast á nøktandi hátt.

Niðan fyri nevndu skipanir/útbúnaður skal lúka nevndu krøv, umframt at fylgja viðkomandi faknormum.

Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði,og skulu tøkni og veitingar tískil veljast við atliti at hesum.

6.1 Veitingar (til bygningin)

Allar veitingar, so sum el, vatn, tele, kloakk eru í økinum, og skal bygningurin knýtast at verandi veitingum. Kannast skal, um verandi veitingar eru nøktandi til virksemið í bygninginum og skulu tillagast eftir tørvi.

Skipanir skulu fyrireikast og gerast, so at bygningurin er so orkuvinaligur sum til ber í mun til upphiting og rakstur.

Bindast skal í verandi kloakkskipan og vatnveiting í økinum sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu.
Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Útgreinað krøv til veitingarnar eru partur av framhaldandi arbeiðinum og verða at skjalfesta sambært viðkomandi faknormum.

6.2 Innleggingar (í bygningin)

Allar innleggingar skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.
Bindast skal í verandi skipanir í økinum sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu.
Innleggingar skulu skipast soleiðis, at neyðug røkt av skipanum kann gerast á fullgóðan hátt.



Innleggingar skulu í størst møguligan mun leggjast soleiðis til rættis, at innrætting, rakstur og viðlíkahald gevur minst møguligt órógv fyri virksemi og brúkarar í húsinum, harumframt skal øll útgerð í størst møguligan mun verða orkuvinalig.

Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði og skulu tøkni og veitingar tískil veljast við atliti at hesum.

Stýringar:
Umráðandi við góðum amboðum til optimering av orkunýtsluni. So sum:
- Lækking av hita á náttartíð og annars eftir tørvi (t.d. í ferium)
- Tillaging av hita í hitaskipan eftir útihita

Støða skal takast til, um brúkarar skulu hava møguleika at stýra hitanum, ella hetta skal gerast sentralt (av starvsfólki / húsavørði)

Innleggingar til bygningin eru m.a.:
Hiti, vatn, kloakk og el.

Hiti: Skipanir skulu fyrireikast og gerast, soleiðis at minst møgulig orka verður brúkt til upphiting og rakstur av bygninginum. Bygningurin skal hitast upp við varandi orkukeldu ella fjarhita. Val av oljufýring er ikki ein møguleiki.
Hitaskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsama upphiting av bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

Vatn: Drekkivatnsskipanir skulu skipast soleiðis, at krøv til drekkivatn altíð eru rokkin, og at tryggjað er ímóti tæring í skipanini. Partar av vatnskipanini, ið ikki brúka vatn vanliga, t.d. brandskáp, spulikranar og tílíkt, skulu vera íbundin á ein hátt, at krøv til drekkivatnsgóðskuna støðugt eru rokkin fyri aðrar skipanir.

Frárenningar: Frárenningar í bygninginum skulu skipast í størst møguligan mun, soleiðis, at tørvur ikki er at pumpa frárenningar. Verður neyðugt við pumpum, skulu tær staðsetast uttan fyri bygningin.

El: El skipanin skal nøkta allar skipanir í mun til virksemi í bygninginum. El skipanir skulu tillagast virkseminum við atliti at fleksibiliteti í mun til framtíðar rakstur og røkt á best møguligan hátt.

Føringsvegir: Allir føringsvegir skulu leggjast til rættis, soleiðis at innleggingar eru væl skipaðar og ruddiligar og lætt atkomuligar fyri broytingum og útbyggingum.

Innleggingarbakkar skulu taka atlit at ymisku skipanunum, soleiðis at tær eru skipaðar hvør sær á skynsaman hátt. Føringarvegir skulu brunatryggjast í mun til brunaflokkar.

Stýringar: Ynskiligt er at hava neyva hitastýring, sum tekur atlit at náttarlækking, hitaíkasti, útihita. Miðstøðustýring av hita, sum starvsfólk varar av.

Ljós skal vera egna til sensitivar persónar og má ikki vera stýrt av rørslufølarum.
Umhugsast skal yvirvaking av vindeygum og hurðum, álopsalarm o.a.

6.3 Luftskifti

Luftskiftisskipanir skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum, í flest øll rúm.

Luftskiftisskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsamt luftskifti í bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.



Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði, og skulu luftskiftisloysnir tískil veljast við atliti at hesum.

6.4 Ljós

Serlig atlit skulu takast at ljósi. Fólk við autismu kunnu vera sera viðbreknir um natúrligt ljós og ljósútbúnað. Val av glasfeltum og ljósútbúnaður skal gerast í tættum samstarvi við bygginevnd, so rætta loysn verður vald. Møguleiki skal verða at dempa flest øll ljós, har tað gevur meining í mun til virksemi. Blankar yvirflatur skulu avmarkast, eins og stórar vindeygalflatur. Møguligt skal vera at myrkaleggja og avskerma vindeyguni.

6.5 Net

Netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Tráðleyst samband skal vera í øllum bygninginum, umframt fast samband, ið eisini skal í hóskandi mun vera í arbeiðsrúmum. Innleggingar í sambandi við ymiskar trygdarskipanir nýta eisini fasta netsambandið, tí er umráðandi, at tøk netstik verða løgd kring húsið.

7.0 Krøv og ynski til bygningslutir

Allir bygningslutir skulu gerast, samansetast/byggjast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til bygningslutir er partur av framhaldandi prosjekteringararbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Val av tilfari skal vera við høgari góðsku í mun til haldføri og ellisdæmi. Bygningslutirnir hvør sær skulu hava langa livitíð og gerast soleiðis, at viðlíkahaldið er so avmarkað, sum til ber.
Vátrúm, so sum høli til reingerð, vásarúm, vesirúm, køkur o.l., skulu vátrúmstryggjast.

7.1 Konstruktiónir

Val av konstruktiónum skal vera kent og tryggjað skynsaman byggihátt.

Atlit skulu sýnast at føroyska veðurlagnum, og skulu konstruktiónirnar dimensionerast til eina vindlast svarandi til 55 m/s. Konstruktiónir, komplettering, yvirflatur & samanbygging av somu, skulu vera haldgóðar í mun til regn, kava, frost og vind.

Berandi konstruktiónir skulu fyrireikast og gerast við atliti at størst møguligum fleksibiliteti.
Berandi betongveggir vera tí bert nýttir í tann mun, hetta er neyðugt fyri ta berandi skipanina og heildarstøðufestið. Konstruktiónir, sum eru úr betong og standa berar, skulu dustbindast.

7.2 Framsíður

Val av tilfari og bygningslutum í framsíðunum skal fremjast við atliti at kendum og haldførum tilfari og bygningsloysnum. Hædd skal takast fyri, at útsjónd passar til umhvørvið, og at bygningssniðið er lagað eftir veðrinum (sól, regni og vindi) soleiðis, at bygningurin bæði kann gagnnýta og samstundis verjast móti náttúrukreftum. Eisini skulu atlit til at framsíður eru lættar at viðlíkahalda.



7.3 Tekja

Tekja skal byggjast úr dygdargóðum tilfari, egnað til føroyska veðurlagið. Takformur skal vera einfaldur og við góðum kendum loysnum. Ynskiligt er, at tekja skal byggjast við halli, har tilfarsval og hall passa væl til føroysk viðurskifti.

7.4 Vindeygu og størri glasumráðir

Val av vindeygum og evt. glasumráðum skal passa til føroyska veðurlagið og vera staðsett skilagott í mun til veður og vind. Hugsast eigur at vera um haldførið og viðlíkahald, soleiðis at livitíðin gerst long. Somuleiðis eigur at hugsast um inniklima og sólávirkan inn í bygningin, bæði ísv. ljós og hita.
Fólk við autismu eru ávirki av ljós og sansa inntryk, tí skulu vindeygu ikki vera størri enn neyðugt fyri at fáa eitt heimligt heim. Nýtslan av stórum vindeygum skal vera avmarkað og umhugsað.

7.5 Skilaveggir

Fólk við autismu eru sera viðkvom fyri ljóði, og skulu allir veggir tí hava hóskandi ljóðklassa til málbólkin.

Skilaveggir og glasumráðir skulu lúka styrkis-, ljóð- og brunakrøv.

Gjøgnumføringar í skilaveggjum skulu ljóð- og brunatettast.

Har valt verður innandura glasumráðir, skal glas vera herdað ella laminerað trygdarglas. Sjónlig merking skal setast á glasumráðir, sum ger glasveggin sjónligan.

Í vátrúmum skulu serlig fyrilit havast fyri tættleikanum í øllum rúmunum, eisini har ymiskt tilfar verður bygt saman, so sum millum vegg og gólv og í hornum. Umhugsast skal nýtsla av homogenum gólv/veggjatilfari.

7.6 Gólv

Gólv skal vera úr slitsterkum og viðlíkahaldsløttum tilfari. Tilfarsvalið skal taka atlit at, at umhvørvið skal vera heimligt, heitt og innbjóðandi, og at búfólk ganga inni á leistum.
Tað er av sera stórum týdningi, at litir á gólvi og lit-skifti millum ymsu gólvini verða vald eftir tørvinum hjá búfólkunum.

Høvuðsinngongdin skal hava flísaálegging, ið hóskar til gólvhita, umframt máttur, sum tryggja, at vátir og skitnir skógvar og koyristólar verða turrir/reinir. Gólválegging á vesum skal vera gliðtrygt.

Gólvbelegningur skal vera taktilt behagiligt og komfortabult fyri búfólki, sum kann hugsast at liggja ella sita á gólvinum.

7.7 Loft

Loftini skulu gerast og fyrireikast soleiðis, at innleggingar skulu goymast. Loftini skulu tryggja góð ljóðviðurskifti
Niðurhongd loft skulu kunna takast niður á hóskandi støðum, so tað slepst til tøkniligar innleggingar, har tað er neyðugt.



Á baðirúmum skulu loft tola sera nógva vætu. Loft skulu kunna reingerast og málast eftir tørvi.

7.8 Út- og innhurðar

Høvuðsúthurðar skulu vera úr góðari góðsku, egnaðar til føroyska veðurlagið og vera "niveau"-fríar.
Høvuðshurðar skulu vera slitsterkar og harðførar við góðari gátt. Høvuðshurð skal vera vard undir taki.
Høvuðsúthurðar skulu vera M10.
Allar útgangandi úthurðar skulu hava fastan vegg ella aðra verju aftanfyri hurðina, sum skal virka sum hurðastoppari.

Innhurðar skulu vera úr góðari góðsku og egnaðar til nógv lastað brúk, svarandi til skúlabrúk. Serliga er umráðandi, at tær eru í ljóðklassa, sum hóskar til málbólkin. Innhurðar skulu vera vanligar hurðar og ikki skjótihurðar. Hurðar inn til baðirúm skulu vera vátrúmshurðar.

Lyklaskipan skal gerast fyri sambýlið – ikki elektroniskt.

8.0 Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað

8.1 Innbúgv og útbúnaður

Fast innbúgv og útbúnaður, sum er nevndur í byggiskránni, skal vera við í verkætlanini.
Innbúgv og útbúnaður skal vera haldgóð vøra, sum er egnað til eitt sambýli hjá fólki við autismu.

Bygginevndin stendur sjálv fyri at keypa leyst innbúgv.

Niðanfyri eru lýst serstøk krøv til ein part av innbúgvinum.

Køkar og vaskirúm:

- Køkselementir - íroknað lúkur skulu vera úr slitsterkum tilfari, høgari góðsku og við Softlock hongslum.
- Borðplátur skulu vera úr slitsterkum tilfari og við høgari góðsku.
- Køksvask, reingerðarvask o.a. skulu vera undirlímað í borðplátu. Køksvask skulu vera við bakka.
- Reingerðarvask skal veitast til vásakøk. Reingerðarvask skal vera undirlímað í borðplátu.
- Spulikrani skal veitast til vásakøk, reingerðarrúm og vaskirúm.

Hvítvørur:
Allar hvítvørur skulu vera orkuvinarligar og lættar at handfara. Hvítvørur er m.a.

- Kókipláta, bakarovnur, høgt køliskáp, frystiskáp, mikroovnur, uppvaskimaskina og eymhetta til allar køkar.
- Vaskimaskinur og turkitrumlur.

Vesir og brúsurúm:

- Vesikummur skulu vera festar til gólv við nøktandi fjarstøðu til vegg.
- Hondvøsk skulu vera vegghongd.
- Brúsuhøvd og hondbrúsa á vesum í íbúðum.



Vásarúm:

- Gosbað, við sjálvreinsandi dýsum.
- Krani skal vera yvir gosbaði.
- Brúsuhøvd skulu hanga undan loftinum, og har vatntilføringin frá blandingartóli til brúsuhøvd er innbygd í vegg.
- Hondbrúsa skal eisini vera í brúsuøkinum.

Ljós armaturir:
Skulu veljast í samstarvi við bygginevnd. Flest øll amatuur skulu kunna dempast. Ráðgevin skal vegleiða um valmøguleikar, har hugsað verður serstakt um útbúnað, egnaður til fólk við autismu.

9.0 Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal vera ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

Skyldur javnført ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast.

Tryggjast skal, at ásetingarnar í *"Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø"*, ið er sett í gildi fyri Føroyar við *"kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss"* við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvis viðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Ráðgevi skal tryggja í prosjektering, at byggiarbeiðið í mest møguligan mun verður framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal vera millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, harundir byggifundir, sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarfundur og -runda undir bygging verða sum meginregla hildnir 14. hvønn dag. Undir prosjektering skal ráðgevi regluliga hava fundir, har HTU-samskipari undir prosjektering luttekur.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og avvarðandi kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal takast við í felagstreytunum. Sí fylgiskjal 04_HTU-ætlan. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá ráðgeva og arbeiðstakara skal latast tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).

10.0 Fíggjarlig viðurskifti

Bygginevndin og ráðgevin skulu leggja seg eftir at gera eina verkætalan, sum hevur so lágan byggikostnað sum tilber. Miðað verður eftir at projektera, bjóða út og fáa tilboð uppá verkætlanina, áðrenn játtan verður ásett. Tað er tí ikki neyðugt við neyvum kostnaðarmetingum.



11.0 Tíðarætlan (LV)

Víst verður til Fylgiskjal 05 Tíðarætlan.

12.0 Rakstur og Viðlíkahald (ROV)

Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini er at tryggja eitt framhaldandi, nøktandi viðlíkahald. Viðlíkahaldið skal leggjast til rættis og passast til raksturin av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið verða viðvirkandi til at røkka dygdar- og haldgóða bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhendan. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum hava beinleiðis ávirkan á framtíðar rakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virðið í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

12.1 Projektering

Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at rakstur og viðlíkahald av bygninginum verður skynsamt.

Val av tilfari skal stuðla upp undir skynsaman rakstur og viðlíkahald, umframt at val av tilfari skal tryggja:

- Eitt optimalt inniklima, uttan ampa av innandura flatum, herundir: gólv, veggir, loft o.a. sum fæst í samarbeiði við brúkara og rakstrarskipanina, grundað á tær veittu vegleiðingar og fyriskipanir frá arbeiðstakara.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøknuligar innleggingar.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu vera atkomuligir og skulu vera settir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu vera sett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja rørskipanina.
- Eftirlitslúkur herundir El-, HVS-, Ventilatión-, o.a.
- Talvir og skýggjar fyri El-, HVS-, Ventilatión-, o.a.
- Allar tøkniligar lutir o.a.

12.2 Gransking

Valdar loysnir skulu granskast, og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast í mun til rakstur og viðlíkahald fyri allar fasur í prosjekteringini. Gransking skal sum minsta mark fevna um:

- Inniklima
- Fólkatrygd



- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teim oman fyri nevndu

Góðskutrygging skal sum minsta mark innihalda:

- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Greið og fullfíggjað markamót
- Greining av markamót millum fakbólkar
- Samsvar millum tekningar, skjøl, útrokningar, tíðarætlan, kostnaðarmeting
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

12.3 Avhendan

Verkætlanin skal prosjekterast í Revit, og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll rakstrar-, eftirlits- og vegleiðingarskjøl (REV) verða latin byggiharranum.

Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsnið, sum greitt frá í IKT avtalu. Skjøl, sum skulu veitast, eru:

- Vegleiðingar fyri REV:
  - Upplýsingar um týðandi byggilutir, elementir og komponentar, sum kunnu vegleiða rakstrarstarvsfólki í dagligum brúki, eftiransan og viðlíkahaldi.
  - Týðandi byggilutir, elementir og komponentar skulu nágreinast viðv. uppbygnað og funktión. Eisini skal væntað viðlíkahald, tíðarskeið, brúk og veitari upplýsast.
  - Evt. kunnan, upplæring og skeið.

- Viðlíkahaldsætlan
  - 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast.

- Ætlan um rakstrarkostnað
  - Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtslu og reingerð
  - Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið, við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

- Garantiskjøl
  - Allar givnar ábyrgdir/trygdir, harundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast til byggiharra, við avhendan.

- Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar
  - Innregulering-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

- "Sum bygt" tekningar og diagramm
  - Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.



Avtaluseðlar og skitsur.

- "Sum bygt" myndir
    - Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
    - Myndir frá eftirlitinum
    - Myndir frá arbeiðstakara / veitara
    - Myndir frá byggileiðslu

13.0 Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan, er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking skal verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis skal granskingin fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin setur uttanhýsis gransking á verkætlanina - sí evt. tíðarætlan. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l fyri hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak. Gransking verður framd á talgildum palli, veittur av LV.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í SBI anvisning 246
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru arbeiddar inn í undanfarna stig.

14.0 Fylgiskjøl

Fylgiskjal 01_ Om at skabe et autismevenligt miljø
Fylgiskjal 02_ Mennesker med autisme - sociale indsatser, der virker
Fylgiskjal 03_ Rúmskrá
Fylgiskjal 04_ Fyrimynd: HTU- ætlan v/ fylgiskjølum
Fylgiskjal 05_ Tíðarætlan
Fylgiskjal 06_ Ljóð og akustikkur
Fylgiskjal 07_ Økisskipan, Yvirlit – Støðumynd
Fylgiskjal 08_ Uppskot til Ráðgevarasáttmála
Fylgiskjal 09_ Ydelsesbeskrivelse 2012, viðk. punkt
Fylgiskjal 10_ Trú- og heiður váttan um falna skuld til tað almenna (Fyrimynd hjá Landsverk)
Fylgiskjal 11_ Tilboðslisti
Fylgiskjal 12_ YB 2012 – Rådgivernes delse - afkrydsningsskema